# »Forfremmet til herligheden«

Leygardagin 19. januar fór 105 ára gamli Jóhannes Tauser til gravar í Helsingør. Hevði Skaparin bert givið honum 42 dagar afturat, so hevði hann rundað tey 106 árini, sum vit ikki vita um, at nakar annar føroyingur hevur fingið. Hann gjørdist kortini elsti føroyingur við sínum knapt 106 árum. Hann gjørdist eldri enn higartil elsta fólk í Føroyum, Drikka á Fløtti við Gjógv, sum náddi 4 mánaðir yvir 105. Drikka doyði í 1980.

Jóhannes var mettur av døgum, nú hann legði frá sær. At hann legði frá sær, kunnu vit av sonnum siga, tí millum jól og nýggjár knoðaði hann deiggj, sum dótturin skuldi nýta til bakstur, og mikudagin sæt hann í songini og rippaði húkar, og fríggjadagin hjálpti hann dótturini at leggja klæðir saman, og seinni, sama kvøldið, hugdi hann eftir einum sjónbandi av barndómsbygdini Eiði. Dótturin sigur, at hann var so ómetaliga væl fyri hetta kvøldið og at hann livdi við í tí, sum hann sá og hevði viðmerkingar til okkurt av ti hann sá, og vit prátaðu saman um ymiskt frá gomlum døgum – men morgunin eftir legði hann stillisliga árarnar inn eftir ein langan og drúgvan lívsróður og kundi seta “bátin” á Himna strond.

Tað var ein heiðurlig jarðarferð, ið henda aldurskempan fekk henda vakra sólskinsdagin í Helsingør Kirkegård á Møllebakken 5. Kistan var prýdd við Føroyska flagginum, ið lá sum ein dúkur yvir kistuni. Á kistuni lá eisini uniformhúgvan hjá Jóhannesi við áskriftini “Frelsesarmeen.” Um tú hugdi nærri kundi væl síggjast, at húgvan hevði verið nógv brúkt – hann var jú “hermaður” í frelsunarherinum í meira enn 60 ár.

Frammanfyri kistuna stóðu tveir offiserar, annar við “blóð-og-eld-flagginum” hjá Frelsunarherinum og hin við Dannebrog. Teir stóðu alla tíðina meðni andaktin var og tá kistan varð borin út gingu teir undan út á grøvina við báðum fløggunum. Eitt tað seinasta, sum var gjørt á grøvini, var at lora fløggini niður yvir kistuna tríggjar ferðir og veitra við teimum. Saman við báðum fløggunum hekk ein hvítur silkistrimmul, sum avmyndar Himmalin.

Tað vóru hjúnini, Ellen og Kristian Ramild Jørgensen, offiserar innan frelsunarherin í Templet í Keypmannahavn og góð vinfólk hjá Jóhannesi, sum skipaðu fyri jarðarferðini. Høvuðsrøðuna hevði Kristian og tók hann m.a. soleiðis til: “Johannes lange liv har været et vidnesbyrd om den frelse han fandt i Jesu blod.”

Tá fólk innan frelsunarherin doyggja brúka tey eitt ávíst útrykk: “Forfremmet til Herligheden.” Bæði jarðarferðin og ervið var ein talandi vitnisburður um, at her var ein trúðarinnar “hermaður,” sum av sonnum var “Forfremmet til Herligheden.” Í ervinum vóru fleiri, sum ynsktu at bera eina heilsu fram um Jóhannes, m.a. segði núverandi leiðari í frelsunarherinum í Helsingør, Magdalena, ein ung kvinna úr



*Jóhannes Tauser gjørdist næstan 106 ára gamal*

Svøríki, soleiðis: – “Tá vit góvust at hava reglulig útimøtir á gongugøtuni, varð Jóhannes so harmur um hetta, at hann fór einsamallur oman í gongugøtuna við harmonikuni og setti seg at syngja og vitna fyri teimum, sum gingu framvið.” “Vit í Frelsunarherinum fingu, líka til tað seinasta, franskbreyð og bollar oman í salin, sum Jóhannes hevði elt deiggi til.” Báðar døturnar, Aspa og Jenny, høvdu eisini eina heilsu til heiðurs fyri pápan: “Líkamikið hvussu gomul foreldrini verða, so er saknurin og tómleikin har kortini, tá tey eru farin.” “Pápi segði mangan: “Vi skal holde fast i friheden.”

Beint eftir, at hann hevði fylt 104 ár, hevði undirritaði tað gleði at vitja Jóhannes Tauser og dótturina Jenny í heimi hansara í Helsingør. Tá hevði eg eina samrøðu við hann og dótturina um lívið hjá honum. Serliga var tað hansara andaligi vitnisburður, sum eg var áhugaður í at hoyra. Eg skrivaði nakað niður av tí, sum vit prátaðu um hesa løtuna, við tí í hyggju, at onnur skuldu fáa lisið hetta. Tað eydnaðist mær ikki at fáa greinina

> *Tað, sum hugtekur Jóhannes mest av øllum er at tosa um fullkomna endurloysingarverk Kristusar á Golgata.*

í nakað blað tá, men nú havi eg fingið sosialin at endurgeva greinina í óbroyttum líki, hóast maðurin ikki longur er ímillum okkara. Eg fari at biða lesaran bera yvir við mær, men nú kann greinin eisini verða minningarorð um Jóhannes.

Eg eri sera glaður um, at eg kom at kenna Jóhannes, áðrenn hann fór her frá, og tað var í evstu løtu, tí eg meti, at ein slíkur maður hevur so nógv at læra okkum yngru. Sjálvur kenni eg tað soleiðis, at hansara vitnisburður hevur verið mær ein persónligur íblástur. Eg ynski, at vitnisburðurin hjá hesum aldrandi trúgvandi manni má vera til gleði og signing fyri teg, sum lesur.

> *”Eg hoyri fótafetini av Jesusi úti í gongini.”*

### 105 ára gamal eiðismaður búsitandi í Helsingør

*“Eg hoyri fótafetini av Jesusi úti í gongini”*

Í 1902 var tað neyvan nakar norðuri á Eiði, sum ímyndaði sær hvussu heimurin fór at síggja út í endanum av 20 øld, og enn minni hvussu tey fyrstu 7 árini av 21 øld fóru at verða. Hetta árið, 23. februar, varð eitt dreingjabarn borið í heim norðuri á Eiði, sum kom at uppliva 20 øld á tamb upp á gott og ónt, og í dag er hann farin um tey fyrstu 7 árini av 21 øld. Í 1902 búðu gott 15.000 fólk í Føroyum. Í hansara livitíð er fólkatalið meiri enn trý faldað í Føroyum.

Maðurin er Jóhannes Tauser av Eiði. Hann hevur búleikast í Helsingør síðani 1959. Undirritaði hevði tað stóru gleði at vitja hann og dótturina, Jenny, í mars mánaða í 2006 Hevði sjálvandi boðað frá, at eg fór at koma, og tá eg kom innar í hugnaligu stovuna kendi ein angan av nýbakaðum bollum, tí ”hesin fremmandi maðurin má fáa ein góðan drekkamunn við nýbakaðum bollum, tá hann kemur,” hevði aldrandi pápin sagt við dótturina. Dótturin segði mær, til mína stóru undran, at pápin hevði sjálvur knoða deiggið. Undirritaði kann leggja afturat, at drekkamuðurin og bollarnir gagnaðust ómetaliga væl.

Tað var áhugavert at sita hendan seinnapartin og tosa við Jóhannes, sum hóast sín høga aldur, er klárur og minnist væl frá gomlum døgum, og dugir væl at greiða frá. Jóhannes hoyrir ikki væl longur, og tí kann tað vera torført hjá fremmanda fólki at samskifta við hann, men so skjótt sum hann fangar hvat tað er tú sigur, er hann skjótur at svara, og tað, sum honum allarbest dámar at tosa um er um Frelsara sín og tænastuna innan Frelsunarherin, sum blivu til mong rík ár. Tí kemur hendan lívssøgan at snúgva seg mest um tann andaliga partin av hansara lívi.

### Nógv forvitnisligt í lívsskjáttuni

Jóhannes upplivdi fyrra heimsbardaga sum tannáringur, og seinna heimsbardaga upplivdi hann í sínum bestu manndómsárum, tá hann m.a. sigldi sum kokkur við einum skipi, sum kallaðist Marité. Tað eru ikki smálutir, ið slík fólk hava fingið í lívsskjáttina, og tí er tað umráðandi, at tey ikki sleppa um sýnuna uttan fyrst at hava loyvt okkum yngru at kaga niður í skjáttina; og tað var tað, sum eg gjørdi hendan hósdagin, í mars mánaða í fjørð, í heimi hansara í Helsingør, sum bæði hann og dótturin, Jenny, skulu hava stóra tøkk fyri.

### Úr ódnarveðri inn í stillan sjógv

Jóhannes vaks upp undir vanligum korum norðuri á Eiði. Foreldrini vóru Maria og Jákup Poulsen. Maria var ættað úr Sørvági og Jákup var Eiðismaður. Tey fingu átta børn, fimm gentur og tríggjar dreingir, har Jóhannes var næstelstur í systkinaflokkinum.

Tá hann var 15 ára gamal fór hann til skips. Meðni hermótini bardust á Europeiska meginlandinum, sigldi Jóhannes í Norðuratlantshavinum við sluppuni Galway. Hann greiðir frá einum ódnardegi, sum hann mangan hevur hugsað um ígjøgnum sítt langa lív: ”Eg minnist serliga páskini 1917. Vit komu í eina øgiliga kavaódn og vit skuldu inn um eina smala innsigling, sum vit ikki funnu orsaka av kavaódnini, men tá vit so til endans sóu innsiglingina og Galway kom innum, tá varð deyða stilli. Hetta gjørdi stórt inntrykk á okkum allar, og hesar páskirnar tosaðu vit mangan um eftir tað.”

Hendan tilburðin hevur Jóhannes, seinni í lívinum, mangan samanborið við, tá hann í bestu manndómsárum leitaði inn í tað einastu tryggu havnina og tað gjørdist stilt í hansara sál. Eisini tá ”sigldi” hann inn í eina havn har innsiglingin var smøl og torfør at koma ígjøgnum, men innum kom hann, og tá gjørdist stilt og friðfult, og tað hevur tað verið til dagin í dag, tí í dag, 105 ára gamal, situr Jóhannes friðfullur og stillur og bíðar eftir, at Jesus skal koma og flyta sál og anda hansara heim í Himmalin til sín.

Hetta var tað djúpa inntrykkið, sum eg fekk av hesum manni, hesa løtuna eg sæt og tosaði við hann og dótturina Jenny. Eg segði við hann, at tá ein er vorðin so gamal sum tygum eru, so veit ein, at Jesus er ógvuliga nær. Tá svaraði hann mær: ”Eg hoyri fótafetini av Jesusi úti í gongini.”

Saman við foreldrum sínum kom Jóhannes í kirkjuna á Eiði, har hann hoyrdi orð Guds verða lisið og prædikað, men hann kom eisini, bæði sum barn og sum ungur, til møtir, sum menn hildu, ið komu ferðandi til bygdina. Hesi møtini vóru ofta hildin í dansistovuni á Eiði. ”Eg minnist tá Andrew Sloan, Jens Klæmint Isaksen og Victor Danielsen komu at hava møtir norðuri á Eiði. Eg minnist so væl, tá Jens Klæmint segði hesi orðini á einum av hesum møtunum: ”Hygg upp á Jesus.”

Tá Jóhannes, meiri enn 90 ár seinni, kann minnast hesi orðini so klárt, so er tað tí, at tey hava gjørt stórt árin á hann, og einki er ivast í hava hesi orðini verið virkandi til, at hann fleiri ár eftir hetta persónliga hugdi á Jesus og sá tað æviga lívið.

### Frá Poulsen til Tauser

Sum 19 ára gamal kom hann at sigla við einum Suðuroyarskipi og var tí nógv á landi á Suðuroynni. Har var ein Havnagenta, sum var komin suður at tæna á Tvøroyri. Gentan kallaðist Alexandra. Tey blivu trúlovað og seinni giftust tey, og búsettust í Havnini. Tey fingu synirnar Jákup Martin,